# Mótakvøld fyri 200 kvinnum

**Kvinnan – vælvera og vakurleiki. Tað var heitið á kvøldinum, sum Handilskjarnin skipaði fyri hóskvøldið.**
**Einar 200 kvinnur úr øllum Føroyum vóru komnar at hoyra, hvussu tær kunnu gerast enn vakrari.**

MÓTI
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*



*60 prosent av garderobuni hjá kvinnuni skal verða tilbehoyr, segði Hans Fróði Hansen*

Kvinnur, kvinnur, kvinnur – tey einastu mann-fólkini, sum vóru at finna í Handilskjarnanum hóskvøldið, vóru tey, sum skonktu hvíttvín og á aðran hátt tæntu teimum innbodnu kvinnunum.

Hans Fróði Hansen, stylistur, tók yvir pallin og byrjaði við at siga, hvussu lætt tað var at hava eitt smíl uppá hetta kvøldið.

– Tit síggja stak gott út allar, og tað er altíð stuttligt at hyggja at fólki, sum hava gjørt nógv burtur úr sær sjálvum.

Hann tosaði nógv um, hvussu týdningarmikið tað er at vera positivur og at rósa hvørjum øðrum.

– Allur vakurleiki og øll vælvera byrjar í høvdinum við okkara hugburði. Eg eri so troyttur at hoyra um hesi kiloini, royn og tak tað vakrasta fram í tær sjálvum og ver stolt av hesum.

## Ymiskir stílar

Fimm ymiskar kvinnur komu inn á pallin í ymiskum klædnastílum. Onkur var buttut, onkur stutt og ein onnur long og kløn - og allar riggaðu stak væl.

Hans Fróði Hansen, vísti á, hvussu lætt tað er at síggja gott út, um ein dugir at taka fram tað mest positiva í útsjóndini.

– Tað eru trý ting, sum lýsa tað mest feminina hjá kvinnuni. Tað er bringan, nakkin og ankilin – og akkurát har hava vit sjáldan so nógv kilo at berjast við.

Fyri at framhevja bringuna, heldur Hans Fróði, at ein skal vera í niðurringaðum blusum, fyri at vísa nakkan, skal hárið setast upp, og fyri at vísa ankilin, er best at vera í kjóla.

Eisini vil hann, at kvinnur skulu brúka høghælaðar skógvar.

– Ein kvinna sær klænri og rankara út, um hon er í høghælaðum skóm – og so gongur hon meiri kvinnuligt. segði hann og vísti, hvussu rumpan skal sveiggja.

Handiskjarnin hevði hetta kvøldið 20 prosents avsláttur á øllum damuklæðum, so nógv varð óivað eisini keypt. Eftir fyrilesturin hjá Hans Fróða var kaffi og marsipan- og marengssmákakur á skránni.

## Hvussu nógvar pengar brúkar tú uppá klæðir um mánaðin?



**Asta Jacobsen:**
– Tað kemur an upp á, hvat eg felli fyri. Onkran mánaða onki og onkran mánað eini 1000 krónur.



**Elvina Lauritsen:**
– Eg fái flipp viðhvørt, og tá keypi eg fyri 1000 krónur upp á eitt eygablikk. Eg havi skógvamani, so har fer eitt sindur av pengum.



**Barbara Gregersen:**
– Mamma mín eigur handil, so eg brúki ongar pengar upp á klæði. Eg bara velji mær, hvat eg skal hava úr hennara handli.



**Durita Jørgensen:**
– Eg brúki næstan onki. Kanska 500 krónur í tríggjar mánaðar. Eg dugi nokso væl at seta klæðir saman, so tey síggja nýggj út.



**Hjørdis Háberg Petersen:**
– Eg keypi nógso nógv klæði. Millum 700-1000 krónur um mánaðin.




## Trivnaðarstjóri

Nú trivnaðarstjóri okkara er farin í annað starv, søkja vit eftir nýggjum trivnaðarstjóra.

**Arbeiðsøki**

Tað eru sera fjølbroyttar uppgávur á trivnaðarøkinum og nógv samskifti úteftir. Sum trivnaðarstjóri fært tú ábyrgd av trivnaðarøkinum, sum fevnir um sosialu deild, barna- og ungdómsdeildina og mentamáladeildina.

Saman við politiska myndugleikanum og stjórnini kemur tú at seta kósina á trivnaðarøkinum. Eisini standa stórar avbjóðingar fyri framman, t.d. útbyggingar á skúlaøkinum, yvirtøka av eldraøkinum og umskipan av stuðulsfólkaskipanini.

Trivnaðarfyrisitingin umsitur árliga umleið 210 mió. kr. í rakstri, umframt 37 mió. kr. innan eldraøkið, sum verður endurrindað av landinum. Íløgujáttanin er 37 mió. kr. í 2006.

Saman við borgarstjóra, kommunustjóra, miðfyrisitingarstjóra og tekniska stjóra verður tú partur av leiðslutoyminum í kommununi.

**Førleikakrøv**

Vit høvdu hugsað okkum, at tú sum trivnaðarstjóri gongur á odda at menna trivnaðarøkið, er nýskapandi og hevur dirvi at ganga nýggjar leiðir. Sum trivnaðarstjóri er tað ein fyrimunur, at tú hevur útbúgving á kandidatstøði, hevur fyrisitingarligar- og leiðsluroyndir og gott fíggjarligt innlit.

Er hetta nakað fyri teg? Vit kunnu bjóða eitt arbeiðspláss í stórari menning, har møguleikin er stórur at síggja úrslit í orði og verki.

Treytað av góðkenning fíggjarmálaráðharrans er starvið tænastumannastarv lønt í 38. lønarflokki við tvey ára royndartíð.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú venda tær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tel.: 30 20 10.

Umsókn og avrit við prógvum, ævisøga (Curriculum vitae) o.ø. skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2006 kl. 12.00.

Viðmerkið umsóknina: Trivnaðarstjóri.

REPROZ

Tórshavnar kommuna